## NØVN Í VIKUNI

# Ingi Samuelsen 40 ár



Tá starvsfólkini á Dimmalætting gjáramorgunin, 2. januar, fingu winerbreyð, var tað ikki bara tí, at Dimmalætting hevði fingið nýggjan blaðstjóra. Í gjár flyti Ingi Samuelsen eisini 40 ár, samstundis sum hann kundi sessast í ábyrgdarblaðstjórastólinum.

Ingi Samuelsen er í Dimmalættingarhøpi úr góðum bergi brotin. Hann er sonur Flemming Samuelsen, sum í fleiri enn 50 ár starvaðist sum prentari á Dimmalætting, har eini fimm av brøðrum hansara eisini hava havt sítt lívsstarv.

Flemming er sonur Lenu og Steingrim Samuelsen í Fuglafirði. Steingrim var sonur Andras Samuelsen, stovnara Sambandsflokssins, og var Georg Lindenskov Samuelsen, sum var blaðstjóri Dimmalættingar umleið helmingin av seinastu øld, abbabeiggi Inga. Mamma Inga er Hjørdis. Hon er dóttir Hjalmar og Alu Gåsedal í Sørvági.

Flemming var prentsmiðjustjóri og var tekniskur leiðari á Dimmalætting í mannaminni, og nú hava synir hansara, um man so má siga, »yvirtikið blaðið«. Ingi sum blaðstjóri og Hjalgrim sum fyritaksstjóri.

Ingi tók prógv sum journalistur á journalistskúlanum í Århus í 1990. Hann starvaðst frá 1991 til 2000 á donskum dagbløðum. Áðrenn hann fór at lesa, arbeiddi hann nøkur ár sum blaðmaður á Dimmalætting og eitt ár í útvarpinum. Hann flutti heim aftur til Føroya í apríl í 2000, tá hann varð settur sum tíðindamaður á Dimmalætting.

Ingi hevur síðani 1. februar í fjør verið tíðindaleiðari á Dimmalætting.

# Ungar listarkvinnur í Ribarhúsi í Fuglafirði



*Unga listakvinnan, Kiristina Joensen, sýnir fram vatnlitsmyndir og málningar, sum hon hevur tilevnað tvey tey seinastu árini í Ribarhúsi í Fuglafirði leygardagin*

LISTAFRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*

Leygardagin 5. januar kl. 16:00 opnar myndlistaframsýning á Ribarhúsi í Fuglafirði. Hetta er list í myndum, orðum og tónleiki. Unga listakvinnan, Kiristina Joensen, sýnir fram vatnlitsmyndir og málningar, sum hon hevur tilevnað tvey tey seinastu árini. Skaldskapurin í myndunum er ekspressionistiskur, abstraktur og eksperimenterandi.

Maria Larsen fer at lesa egnar yrkingar, sum hon hevur skrivað tey seinastu árini. Yrkingarnar eru kensluborнar, ekspressionistiskar og søkjandi.

Jenny Niclassen syngur føroyskar sangir, meðan Eyðun Larsen hevur fylgisspælið.

Kristina, Maria og Jenny hava verið vinkonur frá barnsbeini av. Tónleikur hevur verið ein partur av frítíðarítrivi teirra, og nú leggja tær eina ál afturat sínum hugaheimi sum 18 og 19 ára gamlar við einari framsýning og hugnaløtu á Ribarhúsi í myndlist, orðum og tónleiki.

# Serundirvísingin endurskoðast

**Arbeiðið hjá bólkinum, ið skal dagføra serundirvísingina í fólkaskúlanum, er umrøtt í nýggja Skúlablaðnum, sum júst er komið**

SKÚLABLAÐIÐ
*Turið Kjølbro*

Í Skúlablaðnum, sum kom fyri nøkrum døgum síðani, verður arbeiðið hjá bólkinum, ið hevur fingið til uppgávu at viðgera serundirvísingina í fólkaskúlanum, umrøtt. Hesin bólkurin, ið er mannaður av seks lærarum, hevur sett sær fyri at koma við hugskotum um ábøtur. Serundirvísingin í fólkaskúlanum er býtt sundur í tveir partar, serundirvísing vegna serligan tørv og vanliga serundirvísing.

Viðvíkjandi hesum seinna, mælir arbeiðsbólkurin til, at skúlar seta á stovn sertoymi við til dømis 4-5 lærarum. Hesir skulu hava fakligan førleika, áhuga og góð samstarvsevni mótvegis børnum, arbeiðsfeløgum og foreldrum. Teir skulu hava nógvar sertímar um vikuna, verða stuðul hjá serráðgevanum, verða bindilið millum lærarar, serráðgeva og leiðslu, og hjálpa leiðsluni og ráðgevanum at skipa serundirvísingina, soleiðis at mest fæst burtur úr henni.

Fyri at sleppa undan, at tímar ætlaðir til serundirvísing, verða brúktir sum klípi í tímatalvuni, eigur serundirvísingartoymið at verða við í ráðleggingini av tímatalvuni og gera tilmæli til leiðsluna um, hvussu tímarnir best verða nýttir.

Álitið við heitinum “Fólkaskúlin - ein avbjóðing”, heldur nevndin í Føroya Lærarafelag, verða eina góða jólagávu. Álitið byggir á protokollatið, sum varð undirskrivað eftir drúgva verkfallið á vári 2000, og hevur til endamáls at laga skúlan til nýggju fólkaskúlalógina. Meiri um álitið stendur at lesa í blaðnum.

Í skúlablaðnum annars eru greinir um álitisfólkaskeið, viðmerking til Sjónvarp Føroya, ferðastuðulin til næmingar, og annað.



# Ársins fyrsti føroyingur varð ein genta



*Mamman, Jensa Heinesen avmyndað við dóttrini, sum gjørdist fyrsti føroyingur, føddur í ár 2002*

FØÐING
*Ingrid Bjarnastein*

Við ársbyrjan var tað ein genta í Klaksvík, sum varð fødd, sum fyrsti føroyingur, ár 2002. Hon varð fødd 01.01.2002, klokkan 05.40 um morgunin. Gentan vigaði 3300 gramm og var 50 cm long. Foreldrini eita Jensa Heinesen og Jógvan Bertholsen og eru tey búsitandi í Klaksvík. Frammanundan eiga tey seks ára gamla Hans Jákup, sum nú hevur fingið eina lítlasystir, sum ikki bert er hansara fyrsta lítlasystir, men eisini fyrsti føroyingurin føddur í ár 2002.

# Nevan frammaná

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Flestu politistøðirnar í Føroyum siga, at tað var ógvuliga friðarligt um árskiftið og vikuskiftið beint áðrenn. Í Havn vórðu tveir tiknir fyri rúsdrekkakoyring nú millum jóla og nýggjárs. Eisini var løgreglan boðsend í sambandi við húsaófrið vegna drykkjuskap eini tríggjar ferðir. Harav endaði onkur á støðini, men onki álvarsamt var í hesum máli. Smávegis herverk, rútar brotnir, bilrútar knústir, helst av rakettum, men eisini onkustaðni er ein steinur farin ígjøgnum. Sjálvan nýggjársaftan var onki stórvegis. Tað, sum tó var heldur óvanligt var, at ongin yvirnáttaði á politistøðini í Havn sjálvan nýggjársaftan.

– Jú, hetta er heilt vist eitt sindur óvanligt, sigur vakthavandi á politistøðini.

– Tað vóru ongir liggjandi gestir nýggjársaftan. Í okkara arbeiði er tað jú soleiðis, at líkamikið hvat fyri dagur í vikuni tað er, so kann man vænta at fáa onkran innum. Men tó kann tað væl vera, at vit hava koyrt onkran heim, ístaðin fyri at taka hann inn her. Soleiðis royna vit at gera, um viðkomandi er førur fyri at taka sær av sær sjálvum, ella um onkur er heima at taka ímóti teimum.

Men tó ikki so. Politistarnir í Havn eru ikki heild gloymdir í nýggja árinum, tí longu í gjáramorgunin var onkur dottin innum at sova rúsin av sær.

Eitt harðsskapsmál var í býnum í Havn náttina til sunnudagin. Onkur hevði fingið ein neva frammaná, og splintur vóru brotnað av onkrum tonnum. Løgreglan hevur tó okkurt navnið og tískil hava teir eina ábending av, hvør møguliga hevur verið í »nevaleikinum«.

# Hús brend í grund av neyðrakett

**Nýggja árið er byrjað, og sum vant vórðu nógvar rakettir sendar í luftina nýggjársaftan. Neyðrakettirnar, sum tú bert kanst skjóta sjálvan nýggjársaftan, vísa seg at elva til stóran skaða, tá tær detta niður millum hús**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

– Trupulleikin við neyðrakettum er, at tær eru ikki bert villeiðandi, men tá tær detta niður millum hús, kunnu tær elva til stóran skaða, sigur vakthavandi á politistøðini.

– Nógvir velja at skjóta »gamlar« neyðrakettir upp nýggjársaftan, tí tær skulu jú skiftast út einaferð um árið. Men tá rakettirnar verða skotnar upp ímóti vindinum, detta tær niður aftur skjótt, og tær útvikla so mikið av hita, at skaði skjótt kann standast av hesum. Vindurin ger so eisini tað, at rakettirnar detta niður aftur á bygdum øki og er tað her skaðarnir henda. Tað rætta er at skjóta neyðrakettirnar upp undan vindinum, tí soleiðis verða tær í luftini longri, greiðir vakthavandi á politistøðini frá.

Ein neyðrakett datt niður á eini hús í Havnini, og elvdi til smávegis skaðar. Ein onnur neyðrakett fór ígjøgnum eitt kjallaravindeyga á Skála.

– Rakettin var so mikið sterk, at hon fór ígjøgnum ein dupultan rút og inn í eitt kamar. Síðani fór hon inn í mótsattan vegg og breyt eina bygningsplátu, greiðir vakthavandi á politistøðini í Runavík frá.

Ongin stórvegis skaði stóðst av rakettini, av tí at ein granni var so kvikur við einum pulvursløkkjara, at hann fekk køvt eldinum áðrenn hann fekk gjørt nakað serligt um seg.

Triðja neyðrakettin var í Vági. Vakthavandi á politistøðini á Tvøroyri greiðir frá:

– Vanliga fara rakettir beint uppeftir tá eldur verður settur á tær, men hesuferð fór rakettin vatnrætt ístaðin fyri at fara uppeftir. Hon lendi á takinum á húsunum, har hon brast og brendi síðan niður ígjøgnum takið. Húsini vóru í tveimum hæddum. Grundin var gjørd av betong, meðan yvirhæddin var timbur. Øll yvirhæddin var brend, og húsini noyðast at verða bygd av nýggjum. Hóast eldurin gjørdi so nógvan skaða, so var sløkkiliðið á staðnum beinanvegin. Tíbetur breiddi eldurin seg ikki víðari til húsini við síðuna av, og er hetta heppið, tí húsini standa rættiliga tøtt. Húsini vóru eini av teimum vestastu tá koyrt verður vestur á Eiðið í Vági.

# Brotnar tenn og keikt hond

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Í Suðuroy hevur verið ógvuliga friðarligt um ársskiftið. Vakthavandi á politistøðini á Tvøroyri sigur, at teir høvdu bert tikið ein fullan mann og koyrt hann heim.

– Kanska fólk eru vorðin eitt sindur rædd av tilburðunum 2. jólakvøld, tí tá vóru ikki minni enn tríggir bardagar, greiðir vakthavandi á politistøðini á Tvøroyri frá.

Onkur ósemja hevur helst stungið seg upp millum onkrar, ið helst hava fingið ov nógv niðurum. Ein av monnunum breyt nakrar tenn, ein annar fekk eina keikta hond, ein triðji fekk fleiri hol á høvdið.

– Tað vóru eisini vaksnir menn, sum fóru til hendurs, og ikki óvitar. Grundin til bardagarnar er helst tann, at tá brennivínið kemur inn, fer skilið út, metir vakthavandi á politistøðini á Tvøroyri.